

*Janus og Elisabeth saman við soninum Bjarni*



*Hetta er onnur myndin av Janus í bindibókini hjá ommubeiggjanum*

samband við politiið at fáa tikið skipið, áðrenn tað sleppur úr norskum sjóøki. Men norski skergarðurin er stórur og her var ikki lætt at leita. Her var Janus eisini kunnugur. Tað varð rópt eftir teimum í skipstelefonini, men teir svaraðu sjálvsagt ikki aftur.

Tað eydnaðist Janusi í seinastu løtu at fáa sent avboð til ta manning, sum var á veg umborð á Heklu eftir skipinum.

Tað er sunnudagin 19. august kl. 16,30, at teir loysa, og týsdagin 21., kl 9,30 leggja teir at í Kollafirði. Har var nógv fólk at í Týsklandi.

Eirikur Jallur endaði seinni í Vágunum og bleiv til ísfiskatrolarin Mars. Aftur seinni var hann seldur av landinum, og tað allar seinasta sum frættist var, at hann var tikin sum narkosmuglaraskip.

Nakað samstundis sum hetta hendi, varð Kardumummubýurin framførdur í útvarpinum. Fólkaspeiið gav Eiriki Jalli navnið Suffía mostir

## Farmasigling og ferðamannasigling

Aftaná at hava roynt fiski-



*Janus við konuni Annufíu, børnum við makum og abbabørnum*

taka ímóti og kommunuformaðurin Johannes Debes helt røðu.

Annan dagin eftir var farið til Havnar, har gestir vóru bodnir umborð og farið var siglitúr.

Tað frættist einki aftur frá skipasmiðjuni. Tað kom bert eitt bræv frá varastjóranum, har hann segði tað vera púra beint, sum Janus hevði gjørt.

Farið var til Grønlands at fiska við snellu og línu. Seinni róðu teir út við bátum.

Um veturin var tað ísfiskur. Vanligt var at landa í Bretlandi. Tá ið fiskimarkið varð flutt út í 1964, og bretar settu avmarkingar í verk, varð onkuntíð landað skap í nógv ár fór Janus í farmavinnuna. Hann var við í Star reiðarínum, sum var ein roynd at skapa eina føroyska farmavinnu. Hetta gekk ikki nakað serligt.

Tey seinastu árini á sjónum var Janus við Strandferðsluni. Í 1984 fór hann sum skipari við Pride, sum mest sigldi útferðartúrir, millum annað til Mykinesar.

Síðan fór hann sum skipari umborð á Ternuna, har hann var til á vári 1993. Á Strandferðsluni var Janus væl dámdur hava vit fingið at vita frá ovastu rók.

Við Elisabeth fekk Janus trý børn. Tað er Bjarni, giftur við Jórun f. Jacobsen úr Kollafirði, Anna, gift við Magnus Skýlindal, og Hjørdis, gift við Erling í Liða. Tey eiga fýra børn í part. Elisabeth doyði í 1973.

## Gjørdist vestmenningur

Janus giftist aftur við Annufíu úr Vestmanna, og tey eiga dótrina Elisabeth. Janus er eisini blivin langabbi til Aron hjá Elisabeth hjá Bjarna. Janus eigur eisini sonin Kára, og eru báðir synir Janus eisini skiparar.

Hóast Janus í árum eldist, er hann framvegis sera bragdligur. Hann er virkin á ymiskum økjum við báti, sigling, veðrahald og í undirhúsinum í Vestmanna.

Janus býr nú í Vestmanna. Honum dámar væl at greiða frá og kanska eisini at reypa eitt sindur sum ein framvegis rættur kollfirðingur! Men Janus er eisini trúfastur. Samanhaldið í ættini er gott í allar ættir.

Janus hevur altíð verið tjóðskaparmaður. Hesum hevur hann ikki dult fyri. Men familjan spennir vítt eisini á hesum økinum. Ein svágur, giftur við systrini Dydduni, er erkasambandsmaðurin Benny Samuelsen. Her er grundarlag fyri einum trivaligum kjaki. Mestsum man Benny fara at arga Janus við, at hann er føddur sjálvan danska grundlógardagin. Annars var kona Benny og eisini okkurt barnabarn hjá teimum eisini fødd grundlógardagin. Men hetta er meira í samsvar við politikkin!

Sjálvsagt verður dagurin hildin í Kollafirði. Hetta verður í bygdarhúsinum frá kl. 12-18, har øll eru vælkomin.

Ynskt verður honum hjartaliga tillukku.

**ó.**



*Eirikur Jallur kemur inn á Kollafjørð 21. august 1962*

## Andlát og jarðarferðir

**Helma Michelsen**, fødd Rubeksen andaðist á Lágargarið 1. juni, 94 ára gomul. Kistan fer av Lágargarði mikukvøldið kl. 18.00. Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin kl 14.00. Tey, ið vilja minnast Helmu kunnu lata eina peningagávu til sunndagsblaðið. Konta í Eik.

Bønarhald fyri **Annie Helmsdal Poulsen** verður hóskvøldið klokkan 20 í Katólskukirkjuni. Jarðarferðin verður úr sama stað fríggjadagin 6. juni klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Annie kunnu lata Franciskanarkleystrinum Kerit eina gávu. Konta í Eik banka.

---

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at elskaði pápi, abbi og langabbi okkara

**Esmar M. Hansen**

Klaksvík

ættaður úr Mikladali

fór heim til Harran týsdagin 3. juni, 84 ára gamal.
Kistan fer frá kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hóskvøldið kl.18.
Jarðarferðin verður úr Betesda fríggjadagin kl. 13.30.

*Familjunnar vegna*

**Anna, Malena, Óla Jákup og Jógvan Kári**

Tey, ið vilja minnast Esmar kunnu lata eina peningagávu til Zarepta. Konta í peningastovnunum.

---

**Herfinnur Durhuus**

Vestmanna

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 30. mai, 56 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum týsdagin 3. juni kl. 17.00.

Jarðarferðin verður úr Vestmanna kirkju mikudagin 4. juni kl. 14.00.

---

**Dagurin 5. juni. Grundlógardagur**, hildin til minnis um at fría stýrisskipanarlógin kom í gildi í Danmark henda dag í 1849